# Vit eru komin fyri at verða



- Lyklaorðini í taluni hjá løgmanni vóru andsfrælsi og tolsemi, og tað er langt úti, at Jenis og onnur við skulu mótmæla slík grundleggjandi rættindi fyri øll menniskju, sigur Tina Jakobsen úr Friðarboganum

**- Vit arbeiða fyri einum betri samfelagi, og vit eru komin fyri at vera. So kunnu øll umboðandi snæðurskygni spara sær at brokka seg, sigur Tina Jakobsen úr áhugafelagnum fyri tey samkyndu, Friðarbogin**

SAMKYND
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Tina Jakobsen er ein primus motor í áhugafelagnum hjá samkyndum og stuðlandi, og samskipaði hon saman við øðrum konsertina í Grasagarði, har løgmaður luttók við røðu. Tina sigur, at tey eru væl nøgd við tiltakið.

- Serliga eru vit glað fyri uppmøtingina, og vit sóu ung og gomul úr fleiri samfelagsbólkum vitja okkara tiltak. Røðan hjá Jóannesi Eidesgaard var góð, og talan var sum heild um eitt væleydnað tiltak, sigur Tina Jakobsen.

### Signalvirðið

Spurd, hvussu tey tulka signalið hjá løgmanni at siga ja til luttøku í Grasagarði á einum tiltaki, sum skapar so miklan øsing, sigur Tina, at signalið hjá løgmanni hevur stórt virðið.

- Vit eru sera fegin um, at løgmaður játtaði at luttaka, og tað var eisini djarvt av honum. Vit tosa jú um landsins hægsta myndugleika, sum accepterar ein minnilutabólk og proklamerar andsfrælsi og tolsemi, sigur Tina Jakobsen. Tá talan er um landsins tyngsta mann á politiska pallinum, sum heldur røðu á tiltaki hjá teimum samkyndu, er talan sambært Tinu um eitt týdningarmikið signalvirði.

### Atfinningar burturvið

Tina Jakobsen sat sum so mangur annar føroyingur og lurtaði eftir atfinningunum hjá Jenisi av Rana í útvarpinum sunnudagin, har hann kravdi løgmann eftir treytaleysari umbering. Tina Jakobsen undrast á, at ein kann mótmæla tað, sum kom fram í røðuni hjá Jóannesi.

- Lyklaorðini í taluni vóru andsfrælsi og tolsemi, og tað er langt úti, at Jenis og onnur við skulu mótmæla slík grundleggjandi rættindi fyri øll menniskju, sigur Tina Jakobsen.

Hon leggur dent á, at eingin propaganderaði við nøkrum øðrum boðskapi á tiltakinum enn, at samfelagið eigur at geva rúm fyri øllum, og tá slíkt verður mótmælt, er okkurt galið.

- Vit høvdu eina konsert, og løgmaður helt eina røðu, sum í grundini var til allar minnilutabólkar. Vit verða av ávísum fólkum álopin, men samstundis heldur ein rúgva av øðrum bólkum eisini tiltøk til frama fyri síni endamál, sigur Tina Jakobsen, sum eftirlýsir javnrættindi fyri øll.

### Fólk kunnu spara sær

Tina Jakobsen sigur, at tey í Friðarboganum als ikki eru skelkað av atfinningum aftaná, tí tær koma vanliga altíð. Samstundis heldur hon, at tað eru tær somu atfinningarnar og somu pro-argumentini, sum ganga aftur í kjakinum. Men endamálið hjá Tinu og Friðarboganum er greitt.

- Vit eru komin fyri at vera. Einki snæðurskygni kann og skal oyðileggja okkara arbeiði fram ímóti einum betri samfelagi, og so kunnu fólk spara sær at finnast at okkum og brokka seg, sigur Tina Jakobsen at enda.

## Jenis er burturvið



*- Eingin er nóg stórur og høgur at hava rætt til at krevja umbering fyri sjónarmiðini hjá einum øðrum, sigur Kaj Leo Johannesen við Jenis av Rana eftir atfinningar móti løgmanni í ÚF sunnudagin*

**- Vónandi verður tað ongantíð mín lutur at fordøma, og fordømingarnar hjá Jenisi í útvarpinum sunnudagin eru púra burturvið, sigur formaður Sambandsfloksins í sambandi við luttøkuna hjá løgmanni á tiltaki hjá teimum samkyndu á ólavsøku**

SAMKYND
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Ein av teimum trimum samgonguleiðarunum er Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, og hann metir ikki, at luttøkan hjá løgmanni í Grasagarði á tiltaki hjá Friðarboganum á nakran hátt eigur at fordømast.

- Tað er burturvið av Jenisi at krevja eina umbering frá løgmanni. Persónliga metingin hjá løgmanni var, at tað var rætt at halda røðu í Grasagarði, og tað avgerð skal hann sleppa at hava, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Einki samgongustríð

Formaður Sambandsfloksins heldur ikki, at avgerðin hjá løgmanni at luttaka á einum so eldfimum og umstríddum tiltaki fer at seta kílar í samgonguna.

- Hóast hann er ovasti myndugleiki samgongunnar, umboðaði løgmaður sín persón og síni sjónarmið í Grasagarði. Tað meti eg ikki vera skeivt, og vónandi verður tað ongantíð mín lutur at fordøma, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann sigur, at eingin er nóg stórur og høgur at hava rætt til at krevja umbering fyri sjónarmiðini hjá einum øðrum.

### Politisk ábyrgd

Sum floksformaður er tað ikki óhugsandi, at føroya løgmaður einaferð kemur at eita Kaj Leo Johannesen. Spurdur, um hann hevði sagt ja at luttikið á slíkum tiltaki hjá Friðarboganum, er Kaj Leo greiður.

- Ein og hvør politiskur leiðari hevur eina ábyrgd at luttaka, tá hann verður spurdur, og hóast eg ikki í løtuni kann siga, hvørt eg hevði sagt ja ella ikki, um eg var í hesi støðuni, er einki skeivt við at tosa um tolsemi og javnbjóðis rættindi til allar borgarar, sigur Kaj Leo.

Hann undirstrikar, at Sambandsflokkurin byggir á kristna siðaarvin, men tá talan er um etiskar spurningar, kann og eigur ein og hvør at taka sína egnu, persónligu støðu.

## Løgmaður elvir til øsing



*- Avgerð løgmans kann elva til, at kílar verða settir í samgongusamstarvið, sigur Gerhard Lognberg úr Javnaðarflokkinum*

**- Tá løgmaður umboðar og er ovasti myndugleikin í samgonguni, kann hann skapa øsing og seta kílar í samgonguna við luttøku síni í Grasagarði, sigur Gerhard Lognberg, javnaðartingmaður**

SAMKYND
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Javnaðartingmaðurin á Skopun, Gerhard Lognberg, er ikki fegin um avgerðina hjá sínum egna floksformanni at luttaka á tiltakinum hjá Friðarboganum í Grasagarði. Sambært Gerhard Lognberg skal løgmaður ikki gloyma, at hann sum løgmaður umboðar eina samgongu, og at avgerð hansara at luttaka á einum so umstríddum tiltaki kann spjaða.

- Avgerð hansara kann elva til, at kílar verða settir í samgongusamstarvið. At luttaka á hasum tiltakinum kann harafturat eisini elva til øsing, og Jóannes Eidesgaard eigur at hava í huga, at hann er ovasti samgonguleiðari, sum eigur at savna og verja eina samgongu, sigur Gerhard Lognberg.

Hann sigur, at hann roynir at síggja umboðanina hjá løgmanni sum persónliga, men faktum er, at hann sum løgmaður umboðar eina samgongu, og her íkemur ein vandi.

### Samkynd hava tað gott

Gerhard Lognberg heldur, at røðan hjá løgmanni og kjakið sum heild er misvísandi. Hann setur spurnartekin við, um samkynd í Føroyum hava tað so ringt, sum fjøldin mangan fær fatan av.

- Tey fáa loyvi at liva í friði og náðum, og eingin ger teimum nakað. Onkuntíð verða umstøður teirra gjørdar verri, enn tær tykjast at vera, sigur Gerhard Lognberg. Hann metir, at tiltakið í Grasagarði enntá við løgmansluttøku er eitt tekin um vágafýsni og framfýsni frá Friðarboganum, og hetta er meiri, enn fleiri aðrir minnilutabólkar avrika.

- Eg taki ikki undir við teirra lívshátti, tí skriftirnar tala greitt um hesi viðurskiftini, men eg eri góður við og góðtaki øll míni medmenniskju, sigur Gerhard Lognberg.

## Løgmaður ræður sjálvur



*- So leingi, løgmaður ikki áleggur samgonguni at taka undir við einum ávísum politikki, kann hann ikki kritiserast fyri sína avgerð, sigur Óli Breckmann*

**- Løgmaður hevur fullan rætt at velja, hvørji tiltøk hann luttekur á, og vit fara so ikki at biðja hann koma við eini umbering, so leingi Jóannes Eidesgaard ikki áleggur samgonguni nakað, sigur fólkaflokstingmaðurin Óli Breckmann um luttøku løgmans í Grasagarði**

SAMKYND
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Fyrrverandi formaðurin í tingbólki Fólkafloksins, Óli Breckmann, tekur ikki undir við hvøssu atfinningunum hjá Jenisi av Rana í Útvarpi Føroya sunnudagin. Óli metir, at løgmaður hevur fullan rætt sjálvur at velja, á hvørjum tiltøkum hann luttekur, og tí er ikki grundarlag at biðja løgmann koma við umbering.

### Umboðar ikki samgonguna

Óli Breckmann tulkar tað soleiðis, at Jóannes umboðaði ongan annan enn seg sjálvan í Grasagarði undir tiltakinum hjá Friðarboganum, men setir Óli tó nakrar treytir.

- So leingi, løgmaður ikki áleggur samgonguni at taka undir við einum ávísum politikki, sum t.d. rættvísger skrásett parlag, adoptiónsrætt og kirkjuliga vælsigning, kann hann ikki kritiserast fyri sína avgerð, sigur fyrrverandi formaðurin í tingbólki Fólkafloksins. Óli metir tað vera grundleggjandi skeivt, um ein bólkur ger seg inn á náttúrunnar gongd og náttúrunar lógir, og so leingi, løgmaður ikki roynir at ávirka samgonguna, er tað hansara avgerð.

Óli Breckmann metir ikki, at hetta eigur at vera orsøk til øsing og spjaðing í samgonguni, og tað metir hann heldur ikki, at tað er. Spurdur, hvat hann hevði gjørt, um hann sum løgmaður varð biðin um at røða á slíkum tiltaki, drálar Óli.

- Eg meti ikki, at tey nakrantíð høvdu biðið júst meg komið at tala á slíkum tiltaki, sigur ultrakonservatisturin skemtandi.

**Tíverri fekst eingin viðmerking um løgmansluttøkuna í Grasagarði frá umboði úr Tjóðveldisflokkinum**